# VINNUSÍÐUR

SAMBAND
JAN MÜLLER
JAN@SOSIALURIN.FO
TLF 341800



*Týska rannsóknarskipið, "Merian", liggur á Havnini, nú ráðstevna og fyrilestrar verða hildnir í Føroyum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Vísindalig ráðstevna í Norðurlandahúsinum

**Í samband við ráðstevnuna, har serfrøðingar úr fleiri ymiskum londum luttaka, verður eisini skipað fyri fyrilestrum, sum eru almennir. Fyrilestrarnir verða í kvøld og fríggjakvøldið**

RÁÐSTEVNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í hesum døgum er ráðstevna í Norðurlandahúsinum undir heitinum, "Arctic – Subarctic Ocean Fluxes", stytt ASOF.

Ráðstevnan er endin á eini langari kanningarrøð, sum hevur havt til endamáls at kanna havstreymarnar millum Atlantshavið og arktisku havøkini norðanfyri okkum.

– Hesir streymar føra bæði hita og salt við sær, og teir hava stóran týdning fyri veðurlagið á allari klótuni – ikki minst um okkara leiðir.

Á heimasíðuni hjá Fiskirannsóknarstovuni verður greitt frá ráðstevnuni, sum er í døgunum, 28. juni til 1. juli.

Í samband við ráðstevnuna, har serfrøðingar úr fleiri ymiskum londum luttaka, verður eisini skipað fyri fyrilestrum, sum eru almennir.

– Fyrilestrarnir snúgva seg um sambandið millum veðurlag, streymar og lívið í havinum, serliga um okkara leiðir.

Fyrilestrarnir verða fýra í tali; tríggir á norskum og ein á føroyskum. Teir verða í Norðurlandahúsinum í kvøld og fríggjakvøldið, bæði kvøldini klokkan 19.30.

Í kvøld fer Svein Østerhus, sum starvast á Universitetinum í Bergen, at halda fyrilestur undir heitinum, "Havet og klimavariasjonar dei siste 100 år".

Helge Drange, sum starvast á Nansen Senteret í Bergen, fer at røða um evnið, "Hvordan bliver klimaet de næste 100 år".

Hesin fyrilesturin verður eisini í kvøld.

Fríggjakvøldið fer Harald Loeng, sum starvast á Havforskningsinstituttet í Bergen, at viðgera spurningin, "Hvordan vil kommende klimaendringer påvirke fisk og andet liv i havet".

Fjórði og seinasti fyrilesturin í røðini verður hildin av Boga Hansen, sum starvast á Fiskirannsóknarstovuni.

Bogi fer fríggjakvøldið at røða um áhugaverda evnið, "Hvørja ávirkan fáa veðurlagsbroytingar á lív og fiskiskap á Føroyagrunninum".

Kanningarnar eru fíggjaðar úr evropeiskum og norðuramerikanskum granskingargrunnum.

Fiskirannsóknarstovan hevur tikið lut í hesum kanningum við fígging úr felags evropeiska granskingargrunninum.

Tað er Fiskirannsóknarstovan, sum skipar fyri ráðstevnuni í Føroyum.

Í samband við ráðstevnuna, liggur týska rannsóknarskipið, "Merian", á Havnini hesar dagar, ráðstevnan varar.



# Fyrrverandi reið

**– Jú, hetta verður spennandi, og eg gleði meg at fara undir vinnuligt virksemi aftur, sigur Ólavur Petersen, sum saman við konu síni, Kathrinu hevur keypt trolbátin, Gáshøvda av Viðareiði**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Trolbáturin, Gáshøvdi, sum P/F Kneysur á Viðareiði læt byggja í Íslandi í 2003, skiftir nú eigara og heimstað. Útgerðarmaður á Viðareiði hevur verið Kári Kallsberg, sum saman við bróðuri sínum, Hans Jákupi og systkinabarninum, Gunnari Kallsberg, hava átt felagið, sum stóð aftanfyri trolbátin.

Gáshøvdi verður nú heimahoyrandi í Sørvági, og nýggi eigarin er felagið, P/F Húsadalur, sum fyrrverandi reiðarin hjá P/F Vesturvón, Ólavur Petersen og kona hansara, Kathrina Petersen, eiga.

Tá ið P/F Vesturvón varð selt, helt ein langur og áhugaverdur kapittul í lívinum hjá Ólavi uppat.

Men tað var bara fyribils. Ólavur hevði tá verið stjóri og reiðari í P/F Vesturvón heilt síðan 1988, og hann duldi ikki fyri, at tað ikki var við hansara vilja, at stóra og skapandi virksemið hjá felagnum í Sørvági varð selt av oynni.

Tá ið virksemið hjá P/F Vesturvón í Sørvági helt uppat, stovnaðu Ólavur og Kathrina felagið, P/F Húsadalur.

Tað verða Ólavur sjálvur og sonurin, Arnjohn Hvítklett, sum fara at taka sær av rakstrinum av Gáshøvda.

### Í gongd aftur

– Eg havi alla tíðina ætlað mær í gongd aftur, síðan virksemið hjá P/F Vesturvón í Sørvági helt uppat. Havi ligið fram við og hugt eftir skipum, eisini eftir partrolarum. Nú beyðst so møguleikin at keypa Gáshøvda – og vit tóku av, sigur Ólavur.

Hann vísir á, at P/F Húsadalur hevur keypt felagið, P/F Kneys, men talan verður bert um trolbátin, sum kemur við í keypinum.

Sáttmálin millum partarnar varð undirskrivaður mánadagin, og tá ið Ólavur og konan, sum í løtuni eru uttanlands, koma aftur, verður skipið yvirtikið.



*Tað vóru brøðurnir, Kári og Hans Jákup Kallsberg, sum saman við systkinabarninum, Gunnari Kallsberg, ið áttu Gáshøvda*

# Støðan hjá toskinum á

**Fiskidaganevndin heldur, at støðan hjá toskinum á Føroyabanka er hættislig. - Eftirlitið eigur at verða styrkt, bæði við veiðini hjá føroyskum og útlendskum skipum – og serliga hjá trolarum, sum royna á Bankanum, sigur nevndin í sínum tilmæli**

TILMÆLI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri kom Fiskirannsóknarstovan við sínum tilmæli um fiskidagar fyri komandi fiskiár. Tilmælið hjá stovninum var í høvuðsheitum í fimm punktum, 1) Fiskidagatalið hjá línuskipum, útróðrarbátum við línu og snellu og lemmatrolarum við maskinorku undir 500 hk (bólkur 3, 4 og 5) verður minkað við 25%, 2) Eingin serlig toska-og hýsukvota verður latin skipabólkum uttanfyri fiskidagaskipanina, 3) Fiskidagatalið hjá partrolarum (bólkur 2) verður óbroytt, 4) Dagatalið á Føroyabanka verður minkað við 50% í mun til nýtta dagatalið í 2005 og 5) Serligu gýtingarfriðingarnar fyri tosk á landgrunninum, tosk á Føroyabanka og upsa undir Føroyum halda fram.

Sambært lógini um vinnuligan fiskiskap skulu bæði Fiskirannsóknarstovan og Fiskidaganevndin lata landsstýrismanninum í fiskivinnumálum síni tilmæli, og nú um dagarnar fekk almenningurin so eisini innlit í tilmælið hjá Fiskidaganevndini.

### Sama dagatal

Fiskidaganevndin mælir í høvuðsheitum til, at fiskidagarnir komandi fiskiár verða teir somu sum í ár.

Nevndin ásannar, at toskurin á Føroyabanka er illa fyri, og at neyðugt er at